# Bústaðir eru á Vanganum

Ein roynd at fáa limaskipanina hjá Bústøðum at virka á Vanganum varð gjørd í byrjanini av 2023, har nakrar funkur blivu royndar av, og har limir høvdu møguleika fyri at síggja og broyta, hvussu teir eru skrásettir við ynskjum og upplýsingum.

Nú hevur Bústaðir saman við KT Húsinum ment eina lidna skipan, sum virkar á Vanganum.

## Hvussu komi eg á skipanina

Til ber at rita seg inn í skipanina beinleiðis frá Vanganum. Tá tú ert inni á Vanganum, velur tú “Tænastuveitarar” og síðani búmerkið hjá Bústøðum. So ert tú inni í skipanini, og kann síggja og broyta tær skrásetingar, sum tú hevur gjørt.

## Hvørjar upplýsingar kann eg velja og broyta?

Tað eru nakrar ávísar skrásetingar, sum tú kanst velja og broyta. Talan er um hesar:

- Tú kanst velja at vera søkjandi limur ella hvílandi limur.
- Tú kanst velja, í hvørjum býlingi, tú ynskir bústað, og hvørja støddd av bústaði, ið tú hevur áhuga í.
- Tú kanst velja, um tú søkir eftir lestrarbústaði.

Tann grundleggjandi skrásetingin fyri at vera limur er gjørd við støði í vanligum leigubústaði. Um áhugi er í lestrarbústaði, skal tað veljast til. Tá tú ikki hevur tørv á ella ikki ynskir at vera á bíðilista til lestrarbústað longur, kanst tú velja hetta frá aftur, so tú bert stendur sum limur, ið ynskir vanligan leigubústað.

Legg til merkis, at tíni bústaðaynski fevna um tað, sum tú sjálv/-ur hevur fráboðað Bústøðum ella hevur skrásett teg á Vanganum til at hava. Tó er skipanin gjørd soleiðis, at tá Bústaðir tekur nýggj leigumál í nýtslu fyri fyrstu ferð, verða allir limir, sum hava bústaðaynskir í tí økinum, sum nýggju leigubústaðirnir eru í, sjálvvirkandi skrásettir til eisini at ynskja teir nýggju leigubústaðirnar. Um tú ikki ynskir nýggju leigubústaðirnar, kanst tú gjøgnum tína innritan á Vanganum taka teir bústaðirnar burtur, sum tú ikki hevur áhuga í.

## Bústaðaupplýsingar frá Landsfólkayvirlitinum

Tá ið tú ritar teg inn í skipanina hjá Bústøðum á Vanganum, verða teir skrásettu bústaðaupplýsingarnar, sum eru um teg, dagførdir til at vera teir, sum eru skrásettir í skipanini hjá Landsfólkayvirlitinum. Hetta er galdandi fyri limir, sum eru búgvandi í Føroyum. Til ber ikki at velja aðra skráseting av bústaði enn tað, sum er skrásett hjá Landsfólkayvirlitinum. Um henda skrásetingin er skeiv, skalt tú fáa tað rættað hjá tínari kommunu, fyri at fáa tað rætt í skipanini hjá Landsfólkayvirlitinum.

Størsti parturin av okkara samskifti við limir og leigarar er gjøgnum tann teldupostin, sum limirnir hava upplýst fyri okkum. Hetta merkir, at tað í flestu førum hevur størstan týdning, at Bústaðir hevur tín rætta teldupost bústað, fyri at kunna geva tær boð og kunning.

## Gjalding umvegis Mínrokning og Mínboks

Tá tú sum limur ella leigari framyvir verður kravdur eftir ársgjaldi/limagjaldi ella leigugjaldi, verður tað sum meginregla gjørt gjøgnum Mínrokning.

- Um tú hevur Samleikan, fært tú fráboðan um gjaldingina gjøgnum Mínboks. Á tí teldupost bústaðnum, sum tú hevur upplýst á Vanganum, fært tú fráboðan um, at tú hevur fingið boð frá Bústøðum, so tú kanst fara í Vangan/Mínboks og avgreiða gjaldið.

- Um tú ikki hevur Samleikan, fært tú fráboðan frá Mínrokning um gjaldingina á tann teldupost bústaðin, sum tú hevur upplýst Bústøðum, at tú hevur, og kann avgreiða gjaldið tann vegin.
- Um tú heldur ikki hevur teldupost bústað, verður uppkravið sent við posti til tann bústað, sum tú hevur upplýst Bústøðum, at tú hevur.

Um tú hevur skrásett gjaldingina til at vera sjálvvirkandi, skal tú ikki gjalda einaferð afturat. Tú eigur í so fall at síggja á fráboðanini frá Mínrokning, at gjaldingin verður gjørd sjálvvirkandi.

## Um tú ivast í einhvørjum

Vónandi verður tikið væl móti nýggju skipanini og teimum betraðu møguleikunum fyri at skráseta og broyta síni ynskir gjøgnum Vangan.

Um tú hevur spurningar um skipanina ella um tína skráseting, ber til at seta seg í samband við okkum í okkara avgreiðslutíð við telefon ella við at koma inn á gólvið, ella við at senda okkum teldupost á bustadir@bustadir.fo.

Vinarligast

**Bústaðir – Føroya bústaðafelag**

Mars 2024